**VIÐMERKINGAR**

# Vit eru enn á lívi – tillukku!

JOHAN DALSGAARD



**Fólk yvir 30 skuldu langt síðani verið deyð, sigur Johan Dalsgaard, sum hevur funnið og leysliga umsett niðanfyristandandi á alnetinum**

Hetta kan man hugsa um, um man er eldri enn 30, tí øll yvir 30 burdu verið deyð.

Sambært dagsins lógarsmiðum og skrivstovuveldum burdu tey av okkum, sum vóru børn í 40'unum, 50'unum, 60'unum, ja eisini tíðliga í 70'unum, ikki at yvirliva. Barnasengurnar vóru jú málaðar við blýggjbaseraðari máling. Barnasikring var hvørki á heilivágs-gløsunum, hurðum ella skápum, og tá vit súkklaðu var tað uttan hjálm.

Vit koyrdu bil uttan trygdarbelti ella airbags, og at sita aftanfyri í lastini var praktfult. Vit drukku vatn úr onkrari slangu á keiini og øll, børn og vaksin, roykta sum skortsteinar.

Vit ótu breyð við smøri, drukku sodavatn við sukur, men eingin bleiv tjúkkur, tí vit vóru altíð úti og spældu.

Vit heintaðu tyggigummi upp av vegnum, sum vit litaðu grøn við sýrum, og funnu ballstubbar, sum vit roykta. Vit deildu eisini sodavatnina við hini og drukku av somu fløsku, uttan at nakar reint faktiskt doyði av tí. Vit brúktu tímar til at byggja kassabilar av skrambli, sum lá og fleyt, og drønaðu oman gjøgnum brekkur við fullari ferð, fyri síðani at varnast at vit høvdu gloymt at gera bremsur. Aftaná at verða dottin, fóru vit í holt við at loysa tann trupuleikan. Vit hingu afturúr bilum á skoytum, fiskaðu á keiðini, læntu árabátar, róðu uttan vest, koyrdu knallert og klatraðu í haganum eftir hjalpirótum. Vit loyptu og ótu fligir og kókaðu fiskar í einari nikkelbaseraðari dós, og vit duttu á sjógv.

Vit fóru tíðliga út at spæla og vóru úti allan dagin. Til langt aftaná at gøtuljósini vóru tendrað, uttan at nakar kundi fáa fatur á okkum, tí fartelefon høvdu vit so ikki.

Onga Playstation, Nintendo 64 ella X-box, onki sjónvarp ella parabol, video/DVD, souround-sound, mobil, PC'ara ella Internet.

Men vit høvdu vinir og fóru út at leita eftir teimum!

Vit dottu, skóru okkum, brutu armar ella bein, mistu tenn og bløddu, men ongin bleiv saksøktur fyri tað. Tað vóru bara óhapp. Ongin annar fekk skuldina – bara vit sjálvi. Vit bardust, blivu gul og blá og lærdi at koma yvir tað.

Vit funnu upp á spøl við pinnum og bóltum og blikkum, og vit ótu gras og mold og brendu bál. Sjálvt um vit vórðu biðin um at ansa eftir, vóru tað ikki nógv eygu sum blivi stungin út, og grasið vaks ikki í búkinum. Vit súkklaðu og fóru inn til hvønn annan. Onkuntíð bankaðu vit uppá og runnu avstað, og onkuntíð bankaðu vit uppá og fóru inn og snakkaðu við í tí, sum tey snakkaðu um.

Summir næmingar dugdu ikki líka væl sum hinir og so dumpaðu teir og máttu ganga um aftur.

Men nú eru vit øll blivin vaksin og tora at fara í holt við eina avbjóðing. Hetta ættarliðið hevur fostrað nakrar av teimum bestu problemloysarunum og investorunum nakrantíð. Tey síðstu 50 árini hava verði ein eksplosión av nýskapan og nýggjum hugskotum. Vit høvdu fríheit, fiasko, succes og ábyrgd, og vit lærdu at fyrihalda okkum til alt tað.

Og tú ert ein av teimum, tillukku við tí!!!

Fortel hettar fyri øðrum sum upplivdu tað stóru eydnuna at vaksa upp sum barn, áðrenn lóggevandi valdið og aðrir myndugleikar reguleraðu lívið fyri okkara egna besta....

Tað góða lívið var okkara!!!

# Ivast um Hoyvíkarsáttmála

**Sjálvsstýrisflokkurin sigur seg ivast stórliga um tilgongdina í samband við Hoyvíkssáttmálan**

TÍÐINDASKRIV
*frá sjálvstýrisflokkinum*

Sjálvstýrisflokkurin ivast stórliga um tilgongdina í samband við Hoyvíkssáttmálan. Talan eru um sera ørkymlandi framferð, har landsstýrið við løgmanni á odda fyrst kunngerð sáttmála, ið løgtingið ikki hevur havt stórvegis ávirkan á. Síðani tekur ivi seg upp, um hesin sáttmáli skal setast í gildi við løgtingsssamtykt ella við løgtingslóg. Eftir nevndarviðgerð í fleiri mánaðar, ið lítið frættist frá, skulu fleiri lógir broytast í óðum verkum, tí tær møguliga stríða ímóti sáttmálanum. Tað tykist, sum íslendsk áhugamál nú stýra føroyskari lóggávutilgongd, heldur enn at viðgerðin fer fram mál fyri mál, har bæði føroysk og íslendsk sjónarmið verða hoyrd.

Sjálvstýrisflokkurin vil hava fulla greiðu á málinum, áðrenn flokkurin kann samtykkja sáttmálan og tær mongu skundaðu lógarbroytingarnar.

Løgmaður má koma við nøktandi frágreiðing um hesi viðurskifti:

**Ósemja um sáttmálan:** Er ósemja ímillum Ísland og Fø 6royar um sáttmálan og hvørjar lógir skulu broytast í londunum báðum?

**Loysn á ósemjum:** Hví verður møgulig ósemja við Ísland og spurningar um ósamsvar millum sáttmálan og føroyskar lógir ikki løgd fyri felagsnevndina (§ 8) í sáttmálanum) ella ráðið (§ 9) eftir at sáttmálin er samtyktur?

**Íslendska mannagongdin:** Hvussu hava íslendskir myndugleikar samtykt sáttmálan, og eru íslendskar lógir broyttar samsvarandi sáttmálanum?

**Føroysk áhugamál:** Hevur landssstýrið tryggjað sær, at føroysk vinnuáhugamál eru hoyrd bæði í samband við føroyskar lógarbroytingar og í samband við íslendskar handilsforðingar, ið kunnu grunda føroysk krøv um íslendskar lógarbroytingar."

# Frændafundir í bók

**Fyrilestrarnir, sum vórðu hildnir á ráðstevnu í Reykajvík fyri tveimum árum síðani, eru nú komnir út í bók**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Bókin **Frændafundur 5** er útkomin. Innihaldið í bókini er tíe fyrilestrar, sum vórðu hildnir í Reykjavík 19. og 20. juni í 2004. Tað vóru Heimspekideild Háskóla Íslands og Fróðskaparsetur Føroya, sum skipaðu fyri hesi ráðstevnu, sum var tann fimta ráðstevnan í hesi røðini. Tær verða hildnar til skiftis í hesum báðum londum. Meginparturin av fyrilestrunum, sum verða fluttir á tílíkum ráðstevnum, hevur støði í rannsóknum, sum granskarar í báðum londunum hvør í sínum lagi fáast við. Evnini, sum fyrilestrarnir í hesi bók snúgva seg um, eru fjølbroytt, t.d. trúarmál, søga, landbúnaður, bókmentir og alnetið. Flestu evnini eru sædd bæði úr einum íslendskum og føroyskum sjónarhorni. Enskur samandráttur er síðst í hvørji grein.

Ritstjórnað bókina hava Magnús Snædal og Anfinnur Johansen.

Tær føroysku greinirnar eru hesar:

Poul F. Guttesen: *Dópur, samfelag og samleiki.*

Malan Marnersdóttir: *Ísland og íslendingar í føroyskum skaldskapi.*

Turið Sigurðardóttir: *Leiklutur Føroya í íslendskum bókmentum.*

Firouz Gaini: *Ung, mentan og alnót í útjaðaranum.*

Hans Andrias Sølvará: *Hugmyndafrøðilig rák í Føroyum og Íslandi frá 1850 til 1914 – ein samanbering.*

Gunnar Bjarnason: *Seyðatjóðirnar.*

Óli Olsen: *Sigling og útbúgving I – frá landnámi til okkara dagar.*

Gestur Hovgaard: Stovnar og nýskapan á norðurleiðum: *Tvørvísindalig rannsókn á leiklut kommunanna í nýskapan.*

Beinta í Jákupsstovu: *Leik og lærd, vitan og vald. Um siðvenju hjá íslendskum og føroyskum mammum at hava børn á brósti.*

Bókin fæst í bókabúðunum fyri kr. 225.




## Fleiri eru og fleiri sethús verða reist í ár

**Vestmanna:** Fríggjadagin í farnu viku vórðu enn eini sethús reist í útstykkingini í Vestri ovarlaga í bygdini.

Sum skilst verða hesi ikki tey einastu og seinastu í ár í Vestmanna. Væntandi verða fleiri hús bygd í hesum árinum, tí útskrivað eru longu fleiri onnur byggiloyvi til sethús í hesi útstykkingini.

Úr Vestmanna kommunu verður upplýst, at sølan av grundøkjum hevur gingið avbera væl, síðani kommunan í fjør beinleiðis lýsti eftir keyparum til stykkini.

– Enn eru nøkur eftir, og vónandi verða nøkur seld afturat í ár, verður sagt.

**sb.**

## Ein konsert fyri tey ungu

**Fuglafjørður:** Leygarkvøldið í næstu viku verður aftur høvið hjá teimum ungu tónleikahugaðu at fara til konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tað eru tey ungu innan Heimamissiónina, sum aftur hesaferð skipa fyri konsertini, har tríggir tveir bólkar og eitt kór fara at luttaka.

Luttakarar á konsertini verða kórið Vox, umframt bólkarnar Proclaim og ein nýggjur bólkur úr Vágum. Hann er so mikið nýggjur at hann enn einki navn hevur fingið!

Umframt framførslurnar av tónleiki verða somuleiðis víst nøkur videoclip í steðginum millum bólkarnar, eins og har verður andakt hildin.

**sb.**

## Lítil útlendsk veiða í februar

**Fiskiveiða:** Yvirlitið yvir útlendska veiðu í føroyskum sjóøki í februar mánaði vísir, at bert skip úr fýra londum hava roynt her.

Íalt hava norsk skip roynt í okkara sjóøki í 71 dagar, meðan fronsk skip vóru her í 69 dagar. Hinvegin so hava tey russisku verið í føroyskum sjóøki í 37 dagar og bretsk í 33 dagar.

Íalt hava hesi fiskiførini veitt góð 2.000 tons, harav meginparturin – ikki óvæntað – er svartkjaftur.

**sb.**